kvinnur

# Kvinnur bæði tora og vilja

**Hon er ikki valevni, men hevur stóran áhuga fyri politikki og samfelagsviðurskiftum. Sum deildarleiðari fyri Menning og Samskifti í næststørsta peningastovni í landinum heldur Brynhild Setberg tað vera eina blóðskeiva mytu, at kvinnur ikki tora at bjóða seg fram á ovastu rók í vinnulívinum ella politikki. - Tá tú setir tær fyri at taka eina hægri útbúgving, veitst tú longu, at við starvinum aftaná fylgir ábyrgd. Hesum eru nútíðar kvinnur als ikki ræddar fyri at átaka sær, sigur Brynhild Setberg**

KARRIERA

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Handan døkku rútarnar í landnyrðingshorniumá høvuðsskrivstovuni hjá Føroya Banka í Húsagøtu í Havn, situr ein kvinna. Ella rættari, har sita fleiri kvinnur. Ein av teimum er Brynhild Setberg, ið fyri hálvum ári síðani gjørdist deildarleiðari fyri Menning og Samskifti í næststørsta peningastovninum í landinum.

Brynhild Setberg heldur tað vera eina skrønu, at nútíðar kvinnur ikki tora at bjóða seg fram til álitisstørv í samfelagnum. Tað veri seg í vinnulívi ella politikki.

– Jú, kvinnur bæði vilja og tora. Um eg tosi út frá mínum egna lívi, so hava bæði eg sjálv og tær flestu av mínum vinkonum hægri útbúgvingar. Tær eru verkfrøðingar, læknar, búskaparfrøðingar, juristar og arkitektar. Tá tú setur tær fyri at taka eina hægri útbúgving, hevur tú eisini nakrar metingar um, hvat starv tú kanst hugsa tær aftaná. Longu tá tú fert undir undir útbúgvingina, veitst tú, at við starvinum aftaná fylgir ábyrgd. Tað at fáa sær eina hægri útbúgving er longu byrjanin uppá at bjóða seg fram, tí tað er hart arbeiði at gjøgnumføra eina longri útbúgving, og tað er ofta dreymurin um eitt ávíst starv, sum ger, at tú fert undir útbúgvingina. So nei, eg skilji ikki hatta argumentið, at man nýtir nógv ár og setir sær nógv fyri at fáa sær eina ávísa útbúgving, tá ein er komin igjøgnum hesa, vil man ikki bjóða seg fram ella torir ikki. Hetta hongur heilt einfalt ikki saman, sigur Brynhild Setberg.

*Hví gongur tað so seint at fáa kvinnur í álitistørv. Ella er hetta ein myta?*

– Svarið er ikki so einfalt, tí nógv ting gera seg galdandi. Høvuðsorsøkin er allarhelst tað samfelag, vit liva í. Hetta, at tað eru fáar kvinnur í álitisstørvum, er ikki nakað føroyskt fyribrigdi, men eitt alheims fyribrigdi. Um vit seta hetta inn í ein skala, kunnu vit siga, at kvinnur í arabiska heiminum liggja heilt i botni, og kvinnur í norðanlondum liggja høgt uppi. Men taka vit tað í einum norðurlendskum høpi, liggja føroyskar kvinnur niðast. Og aftur; taka vit ST sum dømi, hevur eingin kvinna nakrantíð verið aðalskrivari síðani stovnanina í 1945. Hetta hóast ST er ein stovnur, sum júst arbeiðir

*Framhald á næstu síðu*



*Brynhild Setberg í víðagitna Arne-Jacobsen-stólinum, Eggið, sum Bill Clinton sat í, tá Tórunn Ellingsgaard gjørdi samrøðu við hann aftan á fyrilesturin í Norðurlandahúsinum*